



*Kalesjan kann latast upp og aftur upp á 20 sekund við at trýsta á ein knøtt*

við at trýsta á ein knøtt. Undir koyring má ferðin ikki vera meira enn 50 km/t, tá kalesjan verður aktiverað.

Bilarnir høvdu premieru í Danmark 2. apríl 2005. Har kosta teir oman fyri tvær milliónir at keypa.



*Porsche 911 Carrera S Cabriolet hevur sum standard PASM (Porsche Active Suspension Managment), ið gevur koyrieginleikar í heilt nýggjum dimensiónum*

## Chevrolet framgongd



Koreansku Chevrolet, fyrrverandi Daewoo, høvdu eina framgongd upp á 33,6 prosent í ársins fyrsta kvartali, tilsamans 57.000 seldar bilar

*Kelda: Motor Magasinet*

## Skoda í Kina



Kekkisku Skoda bilarnir verða eisini framleiddir í Kina. Komandi ár byrjar framleiðslan av Skoda Octavia

*Kelda: Motor Magasinet*

## Toyota í Michigan



Toyota hava keypt eitt stórt grundøki í Michigan, USA, til eina granskingar- og menningarmiðstøð. Fyrsta byggistig kostar 870 milliónir krónur, og arbeiði verður til 400 fólk

*Kelda: Motor Magasinet*

# Stórt serblað um bilar í Sosialinum

**Í VikuskiftisSosialinum hesaferð verður stórt innlegg um bilar. Talan er um blaðið "Bilar", sum verður umleið 40 síður við øllum tí nýggjasta innan bilar og bilvinnugreinina. Eisini eru nógvar áhugaverdar greinar í blaðnum**

BILBLAÐ
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Eitt av nógvu serbløðunum hjá Sosialinum er blaðið "Bilar", sum liggur inni í blaðnum komandi vikuskifti.

Blaðið er sera fjølbroytt við øllum frá Formel 1 koyring til 91 ára gamla bilføraran, Axel Olsen á Toftum, sum fór til skips sum 9 ára gamal og nú vil hava nýggjan bil.

Umframt allar bilnýggjheitirnar kunnu vit t.d. lesa um eini hjún í Klaksvík, sum hava koyrt við sama bilmerki í næstan 40 ár, um hvussu t.d. svøvnur, alkohol og møði ávirka okkum í ferðsluni og um kreppuhjálp til bilførarar.

Eisini er tilfar um nýggjastu og mest framkomnu tøknina í nýggju bilunum.

Í blaðnum er annars tilfar um bilar í øllum klassum, bæði familju- og sportsbilar.

